# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

# 150.000 til Frelsunarherin




*Gávukekkurin verður handaður, f.v.: Marnar Andreasen, Niels Edvard Olsen, dagligur leiðari á Herberginum, Sámal Jákup Joensen, samkomu- og økisleiðari hjá Frelsunarherinum, og Árni Andreasen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Sunnukvøldið 26. mars fekk Frelsunarherurin ein gávukekk upp á 150.000 krónur frá tvíburabrøðrunum Marnar og Árna Andreasen, ið var tað, sum kom inn fyri stuðulsfløguna, teir góvu út fyri ólavsøku í fjør**

GÁVA

Á sangmøti í Frelsunarherinum sunnukvøldið handaðu brøðurnir Marnar og Árni Andreasen ein gávukekk upp á 150.000 krónur til Frelsunarherin og Herbergið.

Tá kekkurin varð handaður, segði Marnar Andreasen m.a.: "Fyri ólavsøku í fjør góvu vit fløgu út við andaligum sangum, ið vit hava lært í Frelsunarherinum, har vit sjálvir hava slitið okkara barnaskógvar og fingið okkara tónlistagávur.

Við hesi fløguútgávu vónaðu vit, at vit kundu bera nakað aftur til ta samkomu, sum ríkaði mangar ógloymandi barnadagar í miðbýnum í Havn.

Vit avgjørdu, tá fløgan kom út, at allur peningurin sum kom inn, skuldi fara óskerdur til andaliga og sosiala arbeiði, ið Frelsunarherurin stendur fyri.

Vit vilja takka teimum mongu, sum á ymsan hátt hava stuðlað okkum, so at hetta lat seg gera. Vit hava avgjørt at býti av hesum kekki verður soleiðis at Frelsunarherurin fær tveir triðingar og Herbergið ein triðing".

Sámal Jákup Joensen, samkomu- og økisleiðari, takkaði vegna Frelsunarherin fyri hesa stórfingnu gávu, sum Marnar og Árni sjálvbodnir høvdu givið. Hann segði m.a. at peningagávan til Frelsunarherin fer óskerd til nýggjar sangbøkur, sum stórur tørvur er á í løtuni, og stórur tørvur er eisini á stuðli til Herbergið.

## Andlát og jarðarferðir

**Lisa Haraldsen, Sørvágur**, andaðist í heiminum, leygarkvøldið 25.mars, 71 ára gomul. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju, týsdagin kl. 14. Sungið verður úr sálmabókini. Tey, ið vilja minnast Lisu, kunnu lata eina gávu til missiónshúsið í Sørvági, konto í Føroya Banka.

**Peter Skaalum**, fyrrverandi skúlastjóri, ættaður úr Vági, búsitandi í Mariager, andaðist í heiminum, leygardagin 25. mars, 80 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Mariager kirkju mikudagin kl. 13.

**Hannelina Joensen, frá Gjógv**, andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 24. mars, 68 ára gomul. Farið verður úr Landssjúkrahúskapellinum í dag kl. 17. Jarðarferðin verður úr Gjáar Kirkju týsdagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hannelinu, kunnu lata eina peningagávu til Gjáar Kirkju; konto í peningastovninum.

**Turid Poulsen, fødd Thomsen, ættað úr Skúvoy** fer til gravar úr Vor Frue Kirke í Skive, 28. mars kl. 13.30

**Óskar Vigfusson av Hafnarfjørðinum**, fyrrverandi formaður í Sjómannasamband Íslands, andaðist 22. mars, 74 ára gamal. Jarðarferðin verður fríggjadagin 31.mars kl. 15 úr Vífilstaðarkirkju.

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæra kona, mamma, vermamma og omma okkara

**Hannelina Joensen**
frá Gjógv

andaðist á Landssjúkrahúsinum fríggjadagin 24. mars, 68 ára gomul.

Bønarhald verður á kapellinum á Landssjúkrahúsinum mánadagin kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju týsdagin kl. 13.00.

**Erling**
**Oda, Jørgin, Hannelina, Elsa og Erling**

*Tey, ið ynskja at minnast Hannelinu kunnu lata eina peningagávu til Gjáar kirkju konto í peningastovnunum.*

Kunngjørt verður at kæri beiggi okkara

**Petur Skaalum**
ættaður úr Vági

andaðist í heimi sínum í Mariager 25. mars 2006.

**Halgir, Bjarni, Helena og Gunda**

# Frímerkjadeildin í Smiðjuni




TÍÐINDASKRIV

Postverk Føroya, Frímerkjadeildin, letur upp framsýning í Smiðjuni hósdagin 30. mars kl. 14.

Á framsýningini verða klippini, sum Vígdis Sigmundsdóttir hevur gjørt, sýnd fram. Vígdis verður til staðar, tá framsýningin letur upp.

Framsýningin er opin til 4. apríl, allar dagar frá kl. 14-18.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu og hjálpsemi, tá kæra kona, mamma, vermamma, omma, langomma, dóttir og systir okkara

**Petrea Jacobsen**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk til tykkum á Landssjúkrahúsinum, sum vóru um hana, tøkk til øll tykkum, sum á ymsan hátt hjálptu til við jarðarferðina.
Tøkk fyri blómur og peningagávur til Felagið Fyri Krabbamein.
Tøkk til tykkum mongu, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.
Hjartaliga tøkk øll somul.

**Poli og børnini, mamma og systkin**

**Dagurin í morgin**

**28. mars. Eustachius**, deyður umleið ár 625. Abbati í kleystrinum Luxeuil í Fraklandi. Victor Danielsen varð føddur hendan dagin í 1894